# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Aftur Lort í býin




Í fjør vóru fleiri enn 2000 áskoðarar og sóu Lort í býin. Nýggj Lort í býin fløga kemur út í november, og fara vit at hoyra nýggju sangirnar á stórari konsert í Norðurlandahúsinum hóskvøldið og fríggjakvøldið komandi

*Lort í býin-showið í Norðuranda-húsinum er ferðmikið, fjølbroytt og framúr undirhald fyri alla familjuna*

*Sjúrður Skaale í ummæli av Lort í býin í fjør*

**Lort í býin-show verður aftur í komandi viku, tá Meyla og vinir hennara framføra við dansi, sangi og skemti í Norðurlandahúsinum**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

STROK hevur gjørt av at endurtaka væleydnaða brakið frá í fjør, tá fleiri enn 2000 áskoðarar sóu Lort í býin. Hetta er upprunaføroyskt undirhald fyri børnini og familjur teirra, og var sera væl móttikið í fjør.

Í ár fer Meyla á pallin saman við tí væl syngjandi S'marna, yvirklóka Dia Regin, plágandi Jógvan L. og mongum øðrum, har tey fara at syngja, dansa og skemta sær – og vónandi eisini áskoðarunum. Evnaríku dansigenturnar vera eisini við og fara at seta sín serliga dám á Lort í býin.

### Fløga á veg

Meyla sigur við Sosialin, at hon hevur ikki bara fingið nýggjar vinir, hon hevur eisini fingið fleiri nýggjar sangir. Sangirnir vera allir at hoyra á nýggju STROK-fløguni, sum kemur í handlarnar í november. Men fyrst skulu teir standa sína roynd í Norðurlandahúsinum.

- Jú vit kunnu lova, at Lort í býin er blivið eitt ár størri, eitt ár betri og voksið við minst einum sentimetri, sigur Meyla.

### Dygdargott føroyskt undirhald

Sýningarnar av Lort í býin vera hósdagin 11. oktober og fríggjadagin 12. oktober, báðar dagarnar klokkan 19.30. Atgongumerki eru at fáa í Norðurlandhúsinum og Kunningarstovunum í Havn, Runavík og Fuglafirði. Eisini ber til at keypa atgongumerki á heimasíðuni www.nlh.fo.

Limir í STROK-klubbanum, foreldur teirra og systkin 100 kr. hvør. Onnur 125 kr.

Stuðlað tiltakinum hava Tórshavnar kommuna, Burger King og Norðurlandahúsið.

Til ber at lesa meira um Lort í býin á heimasíðu okkara www.strok.net

# Markleys útbúgving '07

**Lækni? Lærari? Økonomur? Sakførari? Sálarfrøðingur? Hvat vilt tú vera, tá tú verður stór? Hetta var evnið á Markleysari útbúgvingstevnuni fyri miðnámsskúlanæmingum umborð á Smyrli hósdagin**

ÚTBÚGVING
*Annika Hedegaard Isfeldt og Sonja Dalgaard Nolsøe*



*450 av elstu næmingunum úr miðnámsskúlunum í Føroyum vóru við Smyrli hósdagin, at hoyra um útbúgvingarmøguleikar í og uttanfyri norðurlond*

Spurningarnir eru nógvir, tá ið tað snýr seg um, hvat man ætlar sær, tá ið man er liðugur við skúlan.

Hósdagin vóru vit við til Markleysa Útbúgvingarmessuna umborð á Smyrli saman við 450 av elstu næmingunum úr miðnámsskúlunum í Føroyum.

- Vanliga hava næmingarnir eina greiða hugsan um, hvat teir í øllum førum ikki ætla sær at gerast seinni. Tá plagi eg at siga við teir: tá ið tú veitst so nógv um, hvat tú ikki ætlar tær at verða, so veitst tú kanska eisini í veruleikanum okkurt um, hvat tú ætlar tær at verða. Soleiðis byrjar danskarin Jakob Lange fyrilestur sín, sum er settur at vara 14 minuttir.

Hesin fyrilesturin gongur fyri seg í Restaurant Beinisvørð umborð á Smyrli, har nógvir næmingar eru savnaðir fyri at hoyra um útbúgvingarmøguleikarnar í Danmark. Men, sum heitið á degnum eisini bendir á, so eru tað ikki bert útbúgvingar niðri, dagurin snýr seg um. Altjóða Skrivstovan, ið skipar fyri tiltakinum, hevur nevniliga valt at leggja dent á møguleikarnar at lesa í og uttan fyri norðurlond. Leiðarin á Altjóða Skrivstovuni í Føroyum, Holger Arnbjerg, sigur, at tað er ein stórur fyrimunur fyri samfelagið at hava onkran, ið hevur roynt okkurt øðrvísi enn øll hini.

Í døgurðasteðginum heldur Guðrið Hansdóttir eina áhugaverda konsert, ið tykist at dáma øllum næmingunum sera væl. Meðan konsertin er, hava vit eina pausu í tveir tímar, meðan allir teir útlendsku fyrilestrarhaldararnir koyra ein túr runt á Suðuroynni og hyggja eftir vøkru náttúruni har. Eftir steðgin er luftin tíverri við at vera rættiliga tung umborð á skipinum og hetta ger, at konsentratiónsevnini hjá nógvum er fallið so nógv, at tey liggja ymsastaðni runt og sløðast ístaðin fyri at fara til fyrilestrar. Men tá ið vit eru aftur í Havn kl. 16 og útbúgvingardagurin er at enda komin, sita vit eftir við einari kenslu av, at dagurin umborð á Smyrli hevur verið heilt væl eydnaður.